# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

## Brúdleyp

Í dag, 8. juli, giftast í Gråsten Hallbjørg Lamhauge, Glyvrar, og Lars Andreasen, Brabrand.

Brúdleypsadr.: Bustrupvej 43, Dybbel, 6400 Sønderborg.

## Dagurin

**8. juli. Ketil biskupur.** Hesin biskupurin í Würtsburg í Týsklandi var ættaður úr Skotlandi. Sankta Kilian, sum hann varð róptur, varð saman við feløgum sínum Totnan og Kolonat tikin av døgum í árinum 689. Í Norðurlondum fekk hann navnið Ketil, ið eisini hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum. Navnið merkir *hattur* ella *hjálmur*.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Hallur Laskáfoss**

fór heim til Harran.

Tøkk fyri peningagávuna til Zarepta.

*Familjuna vegna*

**Elma, Valborg, Kristina, Sigrun, Poul Nolsøe, Jóhan og Árni**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Sofía Joensen**
**Lillan**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

Tøkk til Lágargarð fyri tíðina, hon var har, og ein serstøk tøkk til starvsfólki á Miðstovuni fyri at tit vóru so væl um hana tey síðstu árini.
Tøkk fyri gávur til Parkinsonfelagið, og fyri góða hjálp til jarðarferðina og ervið.
Eisini takka vit presti og sangarum, og øllum tykkum, sum fylgdu henni til gravar.

*Familjunnar vegna,*

**Sólrun, Jónvør, Helgi og Durita**

Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag:

# Vísindafólk á Føroyamálsdeildini útgivið tríggjar bøkur



*Høvið var hjá fólki at ogna sær bøkurnar og rithøvundarnir skrivaðu í tær. Her skrivar Jóhan Hendrik Winther Poulsen í bókina **Mál í mæti***

Mynd: Jens Kristian Vang

**Í sambandi við at vísindafólk á Føroyamálsdeildini góvu út tríggjar bøkur, varð skipað fyri almennari móttøku í Loftsstovuni á Føroyamálsdeildini hósdagin 1. juli 2004**

Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipaðu fyri almennari móttøku og tíðindafundi á Føroyamálsdeildini hósdagin 1. juli í sambandi við tríggjar nýggjar bókútgávur.

Tað er Føroya Fróðskaparfelag, sum hevur givið allar tríggjar bøkurnar út.

Turið Sigurðardóttir, lektari í bókmentafrøði hevur skrivað bókina: ***Bókmentasøgur - Greinasavn.*** Í bókini eru fimtan greinir um evni, sum fevna frá 18. til 20. øld. Flestu greinirnar hava staðið í ymsum tíðarritum tey seinastu umleið 15 árini. Greinirnar viðgera føroyskar bókmentir og mentan, m.a. út frá hugtøkum sum barokkur, klassisisma, upplýsing, romantikkur, modernisma og postmodernisma.

Anfinnur Johansen, lektari í málfrøði, og Hans Joensen, orðabókaritstjóri, hava ritstjórnað bókina ***Mál í mæti***, sum er heiðursrit til Jóhan Hendrik W. Poulsen, professara, á sjeyti ára degnum. Í bókini er savn av greinum hansara skrivaðum í eitt fjøruti ára tíðarskeið.

Höskuldur Þráinsson, Hjalmar P. Petersen, Jógvan í Lon Jacobsen og Zakaris Svabo Hansen hava skriva nýggja føroyska mállæru *Faroese - An Overview and Reference Grammar.*

Fleiri talur vórðu hildnar á móttøkuni av t.d. Zakaris Svabo Hansen, Jógvan í Lon Jacobsen, og Turið Sigurðardóttir, sum eisini las upp úr síni bók.



*Hjalmar Petersen lesur úr bókini **Faroese – An Overview and Reference Grammar***

Mynd: Jens Kristian Vang



*Fróðskaparfelag Føroya hevur givið út tríggjar bøkur, f.v. Jógvan í Lon Jacobsen og Zakaris Svabo Hansen við bókini **Faroese – An Overview and Reference Grammar**, Turið Sigurðardóttir við bókini **Bókmentir – Greinasavn**, og Anfinnur Johansen við bókini **Mál í mæti***

Mynd: Jens Kristian Vang



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jóhan Sommer Jacobsen, Vestmanna:

# Tikin á bóli av Shell-manning

**Leygarmorgun 3. juli møttust 21 ymiskir Shellbilar við Leynavatn við tíendamáli at "yvirraska" starvsfelagin Jóhan Sommer Jacobsen í Vestmanna í sambandi við hansara 30 ára starvsdag**

Hósdagin 1. juli var móttøka á høvuðsdeildini hjá Føroya Shell á Viðarnesi í sambandi við at 30 ár vóru liðin síðan Jóhan Sommer Jacobsen í Vestmanna, vanliga nevndur Sommer, byrjaði at koyra hjá Shell. Sama dag hevði Eyðun Joensen, serviceteknikari í Norðurstreymi, eisini 15 ára starvsdag.

Í tvær vikur hevði Annfinn Jacobsen, sonur Sommer, sum eisini koyrir oljubil hjá Føroya Shell, fyrireikað eitt tiltak í Vestmanna. Boð vóru send til allar bilførarar hjá Føroya Shell, (teimum sum tað bar til hjá) um at vera við í einum bilafylgi til Vestmanna leygardagin 3. juli at heilsa og ynskja Sommer tillukku við 30 ára starvsdegnum.

Leygarmorgun kl. 8.30 møttust 21 Shell tangalast- og servicebilar við Leynavatn. Síðan var koyrt til Vestmanna í einum stórum bilafylgi. Tá teir kom til Gassadal, bleiv Sommer biðin um at hyggja út gjøgnum vindeyga.

Fyrst visti hann ikki, hvat hann skuldi halda um hetta bilafylgið. Øll familjan og allir starvsfelagar vistu av tiltakinum, men Sommer visti av ongum, fyrr enn hann sá allar 21 bilarnar koma koyrandi oman til Vestmanna.

Bilafylgið koyrdi heilt inn í bygdina til heimið hjá Sommer, har hann var staddur. Yngri sonur Sommer, Hans Kári, hevði goymt allar lyklarnar hjá pápanum, til neyst, persónbil o.a. fyri at tryggja sær at hann skuldi verða verandi heima leygarmorgunin og ikki fara ein túr oman í neystið, sum hann er vanur.

Eftir at bilarnir høvdu koyrt floytandi framvið heiminum hjá Sommer, koyrdu teir oman á kaiøki og stóðu har á rað. Síðani hevði verdótturin, Ann Mari, og familjan, skipað fyri stórum morgunmatarborði fyri øllum bilførarunum og øðrum vitjandi.

Sommer fekk handað eina myndarammu við ymiskum myndum, sum t.d. frá hansara fyrsta arbeiðsdegi, ymiskum tangabilum og øðrum. Tað var sonurin Annfinn, sum hevði savnað myndirnar og handaði pápanum tær.

Fyri Sommer var alt hetta eitt stórt upplivilsi - hann visti av ongum, og hevði ongan illgruna um at nakað var áfatt. Hann helt tað vera sera flott at bilar úr Havn, Eysturoynni, Vágum og enntá úr Klaksvík og Sandoy, vildu brúka ein leygarmorgun til slíkt.

Jóhan Sommer Jacobsen er 60 ára gamal, hann er føddur 3. mars 1944 á Slættanesi, har hann eisini vaks upp. Sum 16 ára gamal fór hann fyrstu ferð til skips.

Hann flutti til Vestmanna í 1964. Giftist í 1971 við Olinu Poulsen, ið er ættað úr Hósvík. Tey eiga 3 børn: Annfinn, 37 ár, hann er útlærdur timburmaður, og koyrir í løtuni sum oljubilførari hjá Føroya Shell í Havn, Malan, 31 ár, hon er sosial- og sunnheitsassistentur, og arbeiðir á Lágargarði í Havn, og Hans Kári, 25 ár, hann hevur nýliga fingið prógv sum skipari og lesur nú víðari til skipsførara.

Sommer koyrdi í árunum 1967-74 kranabil hjá Steingrím Simonsen í Vestmanna.

1. juli í 1974 byrjaði hann sum oljubilførari hjá Shell í Vestmanna, har Jóannes Fonsdal var umboðsmaður.

Tá Jóannes Fonsdal doyði, yvirtók Sommer oljuavgreiðsluna, meðan kona Jóannes, Súnfríða, framvegis hevur Shell-Støðina í Vestmanna.



*Jóhan Sommer Jacobsen við myndarammuni hann fekk frá starvsfeløgunum í samband 30 ára starvsdagin*

Mynd: Tórður Poulsen



*Allir 21 Shellbilarnir stóðu á kaiøkinum í Vestmanna, meðan starvsfelagarnir hjá Sommer fingu kaffi og morgunbreyð í heiminum*

Mynd: Tórður Poulsen



*Gunnar Jacobsen, vinstru megin, sum er Statoil umboðsmaður í Vestmanna, kom eisini inn á gólvið*

Mynd: Tórður Poulsen



*Snorri á Steig, Shell umboðsmaður í Vágum, heilsar her upp á Sommer. Teir eru starvsfelagar og vórðu konfirmeraðir saman í Sandavági*

Mynd: Tórður Poulsen